# Politikari skotin

Næstformaðurin í sosialistaflokkinum í Albania varð myrdur leygarkvøldið. Myndugleikarnir siga, at ein ókendur maður skeyt Fatmir Xhindi í býnum Roskover, sum er einar 100 kilometrar frá høvuðsstaðnum Tirana. Sambært myndugleikunum sat Xhindi í bili sínum, tá hann bleiv raktur av seks skotum. Hann varð alt fyri eitt fluttur á sjúkrahús, men doyði stutt eftir. Formaðurin í sosialistaflokkinum, Gramoz Ruci, segði við fjølmiðlarnar, at talan er helst um eitt politiskt morð. Hann vísti á, at hetta er ein rembingartíð. Albania hevur júst fingið fótin inn um í NATO og søkti um ES-limaskap í síðstu viku. Harafturat verður val um sjey vikur.






*Føroyski landabásurin tók seg væl út í høvuðshøllini á ESE í Brússel. Hann var høgt bygdur, sjónligur og nógv vitjaður av útlendskum keyparum, sum ikki minst vístu áhuga fyri føroyskum laksavørum, men eisini øðrum vørum, sum Føroyar hava í útboði*

ítøkiligar avtalur við nýggjar keyparar spurdust burtur úr á sjálvari framsýningini, men hon ivast onga løtu í, at avtalur fara at spyrjast burtur úr, soleiðis sum útlitini á amerikanska marknaðinum eru í løtuni.

- Alt tekur tíð, og viðurskifti skulu umhugsast gjølliga. Hetta er ein tíð við ótryggleika á altjóða fíggjarmarknaðinum, og tí leypur eingin framav.

At amerikanski laksamarknaðurin er áhugaverdur í tíðum, sum hesum, er lítið at ivast í, og Sosialurin veit um føroyskar laksafyritøkur, sum langt áðrenn ESE-framsýningina høvdu fingið í lag avtalur við keyparar í USA.

- Eg havi skilt, at áhugin í USA fyri føroyskum laksavørum bæði snýr seg um feskan laks, ísaðan laks og portiónir úr laksi. Jú, fyri føroyskar alarar sær hetta spennandi og avbjóðandi út, leggur hon aftrat.

Lena sigur, at soleiðis, sum hon hevur skilt føroyskar alarar, sum vóru við á ESE, er heldur ikki eingin áhugi fyri sílum.

- Eg skilti eisini, at hampiliga stórur áhugi er fyri øðrum fiskasløgum, sum Føroyar hava í sínum útboði, men hetta vita tey, sum við vóru og umboða hesi fiskasløg, betri at siga.

Lena L. Mohr sigur, at leikluturin hjá Sansum var at sniðgeva og byggja ein føroyskan landabás, sum gav føroyskum útflytarum optimalar karmarar um at gera góðar handlar – ein bás, har okkara fyritøkur kunnu »branda« seg optimalt.

- Ein slíkur básur skal vera tíðarhóskandi og vera attraktivur mótvegis teimum, vit vilja skulu vitja okkum, sigur stjórin í reklamufyritøkuni Sansir.



*Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, í práti við Meinhard Jacobsen, stjóra í Faroe Seafood*